Sosialurin

Nr. 201 - 21. oktober 2009

## CIA-fongsul í Litava

Litavski forsetin, Dalia Grybauskaite, sigur seg hava illgruna um, at amerikanska fregnartænastan CIA hevur havt eitt loyniligt fongsul í Litava, og at tað bleiv brúkt til at hýsa monnum, sum vóru undir illgruna fyri at hava samband við yvirgang. Á einum tíðindafundi segði Grybauskaite, at hon kann hvørki vátta ella avsannað, at CIA hevur fjalt fangar í Litava, men at hon og fleiri við sær hava illgruna um tað. Amerikanska sjónvarpið ABC hevur fyrr sagt frá sínum keldum, at CIA hevur havt eitt loyniligt fongsul í Litava.



## Ófriður í Suðurafrika

Forsetin í Suðurafrika, Jacob Zuma, segði í gjár, at stjórnin fer ikki at góðtaka, at ófriðurin teir seinastu dagarnar fer at halda fram. Í fleiri fátækrabýlingum hava svørt mótmælt teimum sera vánaligu livikorunum. Tey hava sett eld á hús og bilar, og nógvastaðni hava samanbrestir verið millum mótmælisfólk og løgregluna. Jacob Zuma vil vera við, at svikafullir embætismenn og vánalig stýring eru orsøkin til, at livikorini eru so vánalig í fleiri býum. Hann leggur tó afturat, at altjóða fíggjarkreppan hevur gjørt ilt verri.

# Tingformaðurin arbeiðir við fleiri valdømum

**Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, vil fegin seta uppskot fram, um at gera Føroyar til fleiri valdømi. Hetta sigur hann júst tvey ár eftir, at undanmaður hansara fekk undirtøku fyri at gera Føroyar til eitt valdømi**

VALDØMI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vit umrøða fleiri valdømi í formansskapinum, og verður semja um eitt tílíkt uppskot, vil eg fegin verða við sum uppskotsstillari.

Hetta staðfestir Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, tvey ár eftir, at undanmaður hansara í formansessinum, Edmund Joensen, saman við tinginum fekk gjørt Føroyar til eitt valdømi, tá veljast skal til Føroya Løgting.

Í gjár avdúkaði Sosialurin, at ein lítil meiriluti á Føroya Løgtingi, sigur seg vera fyri at broyta løgtingslóg um val til Føroya Løgting, soleiðis, at tað aftur vera fleiri valdømi, tá veljast skal.

### Óbúgvin avgerð

Løgtingsformaðurin staðfestir, at hann ongantíð var fyri at gera Føroyar til eitt valdømi og greiðir frá, at hann heldur lítið um háttin, avgerðin varð tikin uppá.

– Avgerðin varð trumfað ígjøgnum av løgtingsformanninum, sum var tá. Hann fekk helvtina av formansskapinum við sær og trumfaði tað ígjøgnum. Fingurin varð ongantíð stungin í jørðina og tí var avgerðin óbúgvin. Men tingið samtykti tað, og tað er sjálvandi hægsti myndugleiki, sigur Hergeir Nielsen.

### Fleiri skift hugsan

Formaðurin á tingi sigur eisini, at tað eru fleiri tingmenn, sum hava skift hugsan.

– Eg havi merkt, at tað eru fleiri og fleiri, sum vilja venda aftur til gomlu skipanina, tí tað hevur ongantíð verið so nógvur lokalpolitikkur á tingi, sum ætlanin var at sleppa undan við hesari skipanini.

– Og hatta við at fleiri kvinnur skuldu koma inn... Tær, sum eru komnar inn, høvdu eisini sloppið inn við fleiri valdømum, heldur Hergeir Nielsen.

Men er tað ikki nakað tíðliga at venda aftur til eina slepta skipan so skjótt. Longu tvey ár eftir hon er komin í gildi?

– Tað er sjálvandi sera óheppið at spæla ping pong soleiðis í føroyskum politikki, men orsøkin til, at tað bleiv soleiðis, er tí tað varð trumfað ígjøgnum. Og so kann eg leggja afturat, at í modernaða Vesturheiminum eru bara tvey lond, sum hava eitt valdømi, og tað eru Grønland og Føroyar, svarar løgtingsformaðurin.

### Formansskapurin má við

Hergeir Nielsen staðfestir tí, at hann fegin vil leggja uppskot fram, um at broyta løgtingslóg um val til Løgtingið.

– Eg havi ongantíð verið fyri einum valdømi, og fái eg undirtøku í formansskapinum, er bestemt ikki óhugsandi, at eg geri tað, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsformaður.

Tó er ikki líkt til, at tað verður einmælt, at formansskapurin vil vera við til hetta.

John Johannesen – sum er við í formansskapinum – er nevniliga ímóti at broyta verandi lóg um val til Føroya Løgting. Hinir limirnir í formansskapinum – Alfred Olsen og Jógvan á Lakjuni – siga seg í spurnakanningin hjá Sosialinum í gjár vera fyri, at gera Føroyar til fleiri valdømi aftur.

### Setir ongan í bás

Spurningurin er tí um verandi løgtingsformaður – hóast hann vil hava allan formansskapin við – nú torir at spæla høgt spæl – sum undanmaðurin hansara – og megnar at broyta skipanina.

– Vit eru so mikið tíðliga í tilgongdini, at ongin skal setast í bás við eini ávísari hugsan. Nógvir møguleikar eru at broyta lógina, og tí er hopileyst at siga, hvør hevur júst hvørja hugsan í verandi løtu, sigur tingformaðurin.




*Eftir at Sosialurin í gjár avdúkaði, at ein tepur meiriluti er fyri at gera Føroyar til fleiri valdømi, staðfestir Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, at hann fegin vildi lagt at tílíkt uppskot fram*